FYLGISKJAL 10

LM-064/2020

SINNISBATI

Tórshavn, 30. juli 2020

Almannamálaráðið
Eirargarður 2
100 Tórshavn

Hoyringsskriv viðvíkjandi Løgtingsmál nr. xx/2020: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Húsalánsgrunn.

Sinnisbati hevur fáar viðmerkingar til uppskotið, sum viðgerð uppskot til broytingar í løgtingslóg um Húsalánsgrunnin. Sinnisbati heldur tað vera sera jaligt, at Landsstýrið hevur valt at játta pengar til at útvega fleiri almennar bústaðir, nú bústaðartørvurin er so stórur, og privati marknaðurin ikki einsamallur kann nøkta tørvin. Umframt verandi skipan, har 5. hvør íbúð verður tillutað Almannaverkið at visitera, er tað sera jaligt og tiltrongt at 200 mio. afturat verða settar av og játtaðar til bústaðarverkætlanir til menniskju, sum hava ein serligan tørv. Tað er gott at síggja í verki, at uppskotið tekur serligt atlit til málsetningin um, at javnseta borgarar við og uttan brek.

Vit ynskja at vísa á eitt av punktunum, sum Sinnisbati legði fram undir valstríðnum í fjør, har bú- og viðgerðastovnar verða viðgjørdir: Sinnisbati ynskir fleiri bústovnar, har viðgerð og bútilboð eru sameind. Seinastu árini hava fleiri tilboð av hesum slagi sæð dagsins ljós, og tað hevur verið eitt væl virkandi tilboð fyri tey, sum hava fingið møguleikan at gera brúk av tí. Fleiri av teimum gomlu sambýlistilboðunum, sum Sinnisbati av fyrstantíð var við til at seta á stovn í Føroyum, kunnu nakað fyri nøkur, men fleiri fjølbroytt tilboð mugu til fyri at nøkta tørvin hjá fleiri í málbólkinum. Í uppskotinum til lógarbroytingina, vera vardir bústaðir umrøddir. Hetta hevur Sinnisbati áður umrødd, og tað er sera jaligt og gevandi, at slíkir bústaðir kunnu fáast til vega, soleiðis at m.a. borgarir við sinnisligum sjúkum, sum eru nóg sjálvhjálpin til at rúma og megna at búgva fyri seg sjálvi, fáa hendan møguleikan.

Leggjast kann afturat, at uppskotið, sum er til ummælis, kann vera við at geva fleiri møguleikar og rúmd til borgarar, sum fyrr, í størri mun, hava følt seg sett til viks í samfelag okkara. Á tann hátt kann lógarbroytingin vera viðvirkandi til enn meira burturbeining av stigmatisering, sum er og hevur verið um umrøddu samfelagsbólkar.

Sjálvt um at Sinnisbati fegnast um, at fleiri pengar eru játtaðir til at útvega fleiri fjølbroyttar bústaðarmøguleikar, er enn langt á mál. Tørvur er á, at játta uppaftur meira fígging komandi árini, um teir langu bíðilistarnar hjá Almannaverkinum, skulu beinast burtur.

Vegna Sinnisbata,

Róa Midjord
Róa Midjord, forkvinna

Laura K. Apol
Laura K. Apol, aðalskrivari